# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúlin í Klaksvík:

## Maskinsmiðir og timbur-menn fingið prógv

**Fríggjadagin 16. desember fingu 10 maskinsmiðir og 6 timburmenn prógv á Tekniska Skúla í Klaksvík. Hesir eru úr Eysturoy, Streymoy og Norðoyggjum.**



***Maskinsmiðir:***
*Fremra rað f.v.: Hanus Árnason Lervig, (P/F Normek), Óli Jákup Túgvustein, (P/F FJM), Jørmund Skoradal, (P/F FJM), Daniel Jacobsen, (P/F KJ-Hydraulik), og Fríðfinn Jacobsen, (P/F Skipasmiðjan á Skála) Aftara rað f.v.: Fróði Poulsen, (P/F KJ-Hydraulik), Leif Arni Lervig, (P/F KJ-Hydraulik), Hans Arthur Leivsgarð Jacobsen, (Sp/F Skarðhamar), Helgi Strømsten, (P/F Normek), og Bent Tommy Vang, (P/F Mekanik v.Oliver Rasmussen).*



***Timburmenn:***
*Fremra rað f.v.: Terji Nýggjagarð, (P/F Kanjon), Sigfríður Olsen, (Sp/F JPK Smíð), og Pól á Sondum Oskarson, (Sp/F Haldur Vang Aftara rað f.v.: Bogi Kajsten Thomassen, (P/F Norðsetur), Hans Pauli Steinberg, (P/F Norðhús), og Jens Pauli Joensen, (P/F Kanjon)*

## Sjúkraflutningstænastan nýggja ambulansu í Vágum



*Hesin Mercedes-Benz Vito, sum er uppbygdur á Landssjúkarhúsinum, skal hava støð í Vágum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin 22. desember tók Landssjúkrahúsið eina nýggja ambulansu í brúk. Talan er um ein Mercedes-Benz Vito, sum er uppbygdur á Landssjúkarhúsinum í Havn.

Bilurin er fult á hædd við tær ambulansur, sum verða uppbygdar uttanlands, bæði viðv. trygd og útgerð. Hesin er tann triði í røðini, sum er uppbygdur á Landssjúkarhúsinum, og sum skilst eru eru portørarnir sera væl nøgdir við hesar ambulansur.

Bilurin hevur støð í Vágum. Fimm fólk eru hesi tænastu í eini vaktarskipan sum kom at virka 1. november 2005, og er skipað á sama hátt sum í Eysturoy.

## Paula og Arnhold Jespersen krúndiamantbrúdleyp



Fyrtsa jóladag hava hjúnini Paula og og Arnhold Jespersen í Trongisvági krúndiamantbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

## JÓLAGÁVAN



*Poul Jóhan Djurhuus*

Vísmenninir komu til fjósið á nátt, teir høvdu ríkar gávur við til barnið.

Hóast jólini sum høgtíð ikki eru umtalaði í nýggja testamenti, so kunnu vit kortini siga, at hesa løtuna í Betlehem hava vit tey fyrstu “jólini,” sum sanniliga eisini vóru eyðkend av at geva gávur - og enntá tær dýrastu gávurnar.

Jólini á okkara døgum eru eyðkend av nógvum fyrireikingarstáki, til tess at høgtíðin kann fáa so stóran týdning sum møguligt fyri okkara familju og okkum persónliga.

Tað er als einki skeivt í, at vit ávísar tíðir á árinum gera nakað serligt burtur úr hugna og gávum, men lat okkum bara ansa væl eftir, at ikki tað, sum jólini hóast alt snúgva seg um, druknar í øllum stákinum, tí tá hava vit mist tað sonnu meiningina við jólahátíðini og hava samstundis tikið frá okkum sjálvum tað sonnu jólagávuna og tann sanna jólafriðin.

Tað, sum jólini snúgva seg um er Frelsarin, sum lat seg føða inn í hendan heim og á tann hátt gjørdist eitt menniskja, so hann kundi doyggja sum eitt syndoffur fyri okkum øll.

Tað var henda sannleika, sum vísmenninir sóðu, tá teir stóðu í fjósinum hesa løtuna og hugdu niður yvir hetta lítla barnið - teir sóðu meira enn eitt fitt barn, teir sóðu lyftini um frelsaran uppfylt í hesum barni, og tað førdi til, at teir góvu frelsaranum tað besta av tí besta - teir offraðu honum gull, roykilsi og myrra.

Hvat sært tú í fjósinum, nú tú situr og jólahugnar tær við familjuni? Sært tú einans barnið? ella sært tú frelsaran, sum kom fyri teg? Um tú ger tað, so trúgv á hann í dag, tá gevur tú fyrst honum tað størstu gávuna, tú kann geva honum, nevniliga tína sál, men tá fært tú eisini sjálvur tað størstu gávuna, sum tær kann ognast, ævigt lív - og kanska er hetta gávan, sum tín nærmasta familja ynskir sær frá tær í kvøld?